# FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

| Kunningarskriv | Dato<br>Argir, 01. desember 2004 |
|---|---|
| Til<br>**Virki, sum veita landinum vørur og tænastur** | J. nr.<br>1200-0017/2004\4 |
| Heiti<br>**Kunningarskriv um einsháttaðar gjaldstreytir fyri tað almenna** | |

Rokningar fyri vørur og tænastur verða skrásettar við gjaldstreytum kontant, tá ið tær verða skrásettar í búskaparskipanini hjá landinum. Hetta merkir, at landið hevur ikki nakað yvirlit yvir, um farið verður út um avtalaðu gjaldsfreistirnar ella ikki. Sagt á annan hátt, hevur Fíggjarmálaráðið ikki nakað yvirlit yvir, hvussu góður gjaldari tað almenna er.

Sostatt er heldur eingin virkin stýring viðvíkjandi rættstundis gjaldingum ella trároyndslu av kredittíð veitarans.

Til tess at bøta um hesi viðurskifti hevur Fíggjarmálaráðið tí tikið støðu til, at sett verður í verk ein virkin gjaldførisstýring fyri vørur og tænastur til tað almenna.

Av hesi orsøk er umráðandi, at ásettar verða neyvar alment galdandi treytir, so at henda uppgáva kann verða umsitin bæði væl og virðiliga. Tí hava hava eisini allir almennir stovnar fingið boð um, at galda skulu so einsháttaðar gjaldstreytir, sum til ber, tá ið tað almenna ger avtalu um keyp av vørum og tænastum.

Samsvarandi hesum fer landið tí at áseta hesar almennu gjaldstreytir, um ikki annað er avtalað:

1. at ein veitari nýtir **somu orðingar um kreditttíðir** millum stovnarnar, t.e. ein veitari hevur somu kredittveitingartreytir fyri Mentamálaráðið, Landssjúkrahúsið, Føroya gjaldstovu og Heilsufrøðiligu starvsstovuna, og
2. at kredittíðin er so mikið rúmlig, at hon í minsta lagi er 21 dagar. Hetta merkir, at orðingarnar t.d. kunnu vera: “gjaldsfreist 28 dagar frá fakturadegi”, “henda mánaðin + 21 dagar”.

Gjaldstovan er samskipandi liðurin í hesum arbeiði og setur eisini almennu treytirnar upp í EDV-skipanina.

Um so er, at stovnarnir hava gjørt serligar avtalur, so eiga teir at ansa eftir, at tílíkar avtalur verða fylgdar: t.d. er standardsáttmálin ABF 92 grundarlagið undir eini semju millum Byggiharrasamtak Føroya (og harvið Landsverk) og Føroya Handverksmeistarafelag, har gjaldsfreistin er 15 arbeiðsdagar.

Goldið skal sjálvandi verða rættstundis. Verður ikki goldið til ásettu tíðina, skal renta verða rindað frá gjaldkomudegi, um hesin er ásettur frammanundan hesum sambært rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um rentu frá 19. mars 2003.

Bárður Nielsen
landsstýrismaður

Petur Alberg Lamhauge
fíggjarmálastjóri

Traðagøta 39 • Postsmoga 2039 • FO-165 Argir
Telefon 35 20 20 • Telefax 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo